UTTAN ÚR HEIMI

## Úr Irak

Myndugleikarnir í Dominikanska Lýðvveldinum kunngjørdu í gjár, at landið fer at taka sínar hermenn úr Irak.

Josá Miguel Soto Jimenez, verjumálaráðharri, segði, at Dominikanska Lýðveldið hevur gjørt av at gera sum Spania, og at landið tí fer at taka teir 302 hermenninar úr Irak. Hann nevndi ikki, hvussu skjótt hermenninir verða tiknir heim, men segði, at tað kann henda longu í næstu viku. Boðini komu rættiliga óvart á, tí fyri fáum døgum síðani segði domikanski forsetin, Hipolito Mejia, at landið fór ikki at taka hermenninar úr Irak enn.

Hermenninir hjá Dominikanska Lýðveldinum hava virkað sum partur av teiri sponsku herdeildini í Irak. Tað gera hermenninir úr Honduras eisini, og týsdagin kunngjørdi honduranska stjórnin, at hon fer eisini at taka teir 368 hermenninar heim. El Salvador hevur harafturímóti boðað frá, at tað fer ikki at taka sínar hermenn úr Irak.

## Sóknast eftir forsetanum

Argentinsku myndugleikarnir hava nú biðið altjóða løgregluna Interpol leita eftir fyrrverandi forsetanum Carlos Menem.

Tann 73 ára gamli Menem er ákærdur fyri svik, og tá hann ikki møtti á rættarfundinum týsdagin, bleiv avgjørt at biðja Interpol leita eftir honum. Hetta var fjórðu ferð, at Menem ikki møtti í rættinum. Seinastu tíðina hevur hann búð í grannalandinum Kili, men hann skal hava sagt, at hann er sinnaður at møta í rættinum.

Argentinsku myndugleikarnir hava ákært fyrrverandi forsetan fyri at hava lagt pengar undir seg, meðan hann var forseti. Eitt nú hava kanningar víst, at hann eigur næstan fýra milliónir krónur í einum banka í Sveits, og myndugleikarnir í Buenos Aires vilja hava at vita, hvaðani hann hevur fingið pengarnar. Illgruni er um, at fyrrverandi forsetin fekk pengar burtur úr ólógligari vápnasølu til Kroatia og Ekvador.

## Hermenn til Haiti

ST-aðalskrivarin mælir nú limalondunum til at senda hermenn til Haiti at tryggja friðin í landinum.

Sambært Kofi Annan er brúk fyri 6.700 hermonnum og 1.600 løgreglumonnum. Í løtuni eru amerikanskir, franskir og kanadiskir hermenn í Haiti. Teir vórðu sendir hagar undir ófriðinum herfyri, sum endaði við, at Jean-Betrand Aristide, forseti, noyddist at flýggja av landinum.

Kofi Annan hevur nú biðið londini í trygdarráðnum taka støðu til áheitanina um at senda eitt altjóða friðarvarðveitandi herlið og løgreglulið til Haiti. Ætlan hansara er, at hermenninir og løgreglumenninir skulu fara hagar tann 1. juni, og at teir fyribils skulu tryggja friðin í tvey ár.

## Picasso kann seta nýtt heimsmet

Picasso-málningurin "Garcon à la Pipe" (Drongur við pípu), er til sølu á uppboði í New York tann 5. mai, og gongur tað, sum serfrøðingar vænta, kann hann seta nýtt prísmet.

Um málningurin verður seldur er ein annar spurningur. Amerikanskir listakennarar hava mett, at søluvirðið liggur um einar 450 milliónir krónur, men fleiri serfrøðingar vænta, at boðið kann koma upp á einar 650 milliónir krónur.

Verður tað prísurin, er tað nýtt heimsmet. Verandi met eigur málningurin "Mynd av Gachet doktara", sum Vincent van Gogh málaði. Tann málningurin varð í 1990 seldur á uppboði fyri 520 milliónir krónur.

# Nú eisini í Basra



*Fleiri skúlabørn vóru ímillum teirra, sum doyðu í bumbuspreingingunum í Basra gjáramorgunin*

**Meðan blóðugur ófriður hevur herjað nógvastaðni í Irak seinastu tíðina, hevur tað verið friðarligt í Basra har suðuri í landinum. Men í gjár var friðurin úti**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Bretsku hermenninir, sum hava eftirlitið við Suðurirak, hava róst sær av friðinum, og teir hava havt hug at leggja amerikanarar undir at fara ov harðliga fram og at eggja til ófrið.

Men gjáramorgunin var friðurin í Basra úti. Klokkan hálvgum sjey lokala tíð brustu tríggjar sterkar bumbur uttan fyri tríggjar løgreglustøðir. Á middegi í gjár var talið á deyðum komið upp á 58, og minst 200 høvdu fingið skaða. Millum tey deyðu vóru fleiri børn. Tey vóru á veg í skúla, tá ein av bumbunum rakti skúlabussin.

Bretsku hermenninir, sum royndu at koma teimum særdu til hjálpar, fingu at kenna, at teir eru ikki so væl lýddir kortini. Fólk tveittu grót eftir hermonnunum og róptu rakstrarróp eftir teimum, skrivar Reuters.

Stutt eftir spreingingarnar í Basra fréttist, at ein bumba var brostin uttan fyri ein løgregluskúla í býnum Zubair sunnan fyri basra. Trý fólk doyðu, og fleiri fingu skaða, teirra millum tveir bretskir hermenn.

Eygleiðarar siga, at støðan hevur verið spent har suðuri í Irak, sjálvt um tað hevur verið friðarligt har. Mánadagin brustu tríggjar granatir tætt við høvuðsstøðina hjá bretsku hermonnunum í Basra.

Við álopinum í Basra í gjár eru minst 80 fólk deyð í Irak teir báðar seinastu dagarnar, og meiri enn 300 eru vorðin særd.

# Bara 6 av 554 eru dømd

**Bretsku myndugleikarnir hava tikið 554 fólk, tí illgruni er um, at tey hava samband við yvirgang. Bara seks eru dømd**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Aftan á atsóknina í USA 11. september í 2001 samtyktu fleiri lond strangar lógir, sum skuldu gera tað møguligt at forða fyri yvirgangi. Eitt nú fekk løgreglan munandi víðari heimildir at handtaka og at varðhaldsfongsla fólk.

Tað hevur kortini víst seg at vera sera torført at fáa tey tiknu dømd. Ein uppgerð í Bretlandi vísir, at har hevur løgreglan handtikið 554 fólk sambært yvirgangslógini, men higartil hava bara seks teirra fingið dóm. 98 onnur eru skuldsett, og 17 eru sett í varðhald í óásetta tíð. Sambært BBC hava nøkur teirra sita í varðhaldi meiri enn tvey ár uttan at vera skuldsett.

Samstundis halda handtøkurnar fram um alt Evropa. Tær seinastu vikurnar hava myndugleikarnir í Spania, Bretlandi, Danmark, Svøríki, Týsklandi, Grikkalandi, Belgia og Niðurlondum tikið meiri enn 80 fólk, sum verða sett í samband við yvirgang ella yvirgangsfelagsskapir.

Bara í Spania eru 18 fólk tikin og sett í samband við atsóknina at tokunum í Madrid tann 11. mars.



# Víðgongda roykibannið í Írlandi

**Írland varð fyrsta landi í Europa, sum kom við víðgongdum roykibanni. Alt eftir hvussu væl írska lóggávan eydnast verður mett at onnur lond fara at ganga somu leið**

ROYKIBANN
*Annika B. Mortensen*

Fyri einum góðum mánaða síðani, tann 29. mars, varð Írland tað fyrsta landi, ið bannaði royking á øllum starvsplássum. Tílík bann eru longu kend, eitt nú í New York og Kalifornia, men Írland er tann fyrsta tjóðin við einum so víðgongdum roykibanni. Royndirnar í Írlandi verða eygleiddar av mongum øðrum londum í Europa, og alt eftir hvussu væl írska lóggávan eydnast verður mett at onnur lond fara at ganga somu leið.



*Nú ber ikki til at roykja og drekka samstundis á pubbum í Írlandi. Summi bera ótta fyri at írska siðvenja kring pubbin er horvin*

### Nýggj gøtumynd

Nýggja lógin í Írlandi ber í sær, at um onkur festur sær í á eini pubb ella matstovu, so er tað eigarin sum skal gjalda bót, og hendan kann verða heili 22.500 kr. Eigarar av vertshúsum gramdi seg beinanvegin um at skula handhevja nýggju lógina, men nú ein góður mánaði er síðani lógin kom í gildið tykist roykibannið kortini at virka.

Veðrið hevur verið hampuligt í apríl mánaða og tí gremja fólk seg ikki um at noyðast út at roykja. Írski heilsumálaráðharrin, Michael Martin, ið hevur arbeitt nógv fyri roykibanninið, heldur at nýggja lóggávan hevur gingið rættliga væl. Hann hevur hildið eyga við ymiskar pubbir og matstovur í Dublin og sigur at næstan eingir trupuleikar hava verið.

– Roykjarar og fólk, sum starvast á øl- og matstovum, hava tikið væl ímótið lóggávuni og gerandisdagurin gongur sína leið sum vænt, sigur Michaek Martin við BBC.

Stjórin á O'Reilly's, ein pubb miðskeiðis í Dublin, sigur at tað longu er vorðið rættliga vanligt at Guinness ølið stendur á barrskivuni meðan fólk fara útum at fáa sær ein guv. Uttanfyri vertshús síggjast nú nógva staðni fastgjørd øskubikur og nymótans hitatól, so fólk kunnu roykja undir opnum himni.

### Óttin hjá øl-og matstovum

Irska heilsuverkið frøist um nýggju lóggávuna, men eigarar av øl-og matstovum bera ótta fyri at nýggja lóggávan fer at minka um søluinntøkur og hava ringa ávirkan á írska siðvenju - at ganga á pubb dagliga. Ótti er fyri at mong av føstu viðskiftafólkunum fara at skipa fyri smáum privatum veitslum, har fólk sjálvi kunnu avgera hvørt tey vilja roykja ella ikki.

Á summum pubbum eru alternativar loysnir. Á Johnnie Fox's pubb, sum liggur í Wicklow fjøllunum við útsýni yvir Dublin, hevur eigarin, Tony McMahon, keypt ein tvídekkara úr London. Bussurin stendur við ølstovu hansara til roykjarar. Starvsfólk hansara eru ikki loyvd inn í bussin, hetta hevur hann fingið løgfrøðiliga vegleiðing um. Á onkrum øðrum vertshúsi eru rútarnir tiknir úr vindeygunum og roykjarar kunnu tískil stinga høvdi útum og fáa sær ein guv.

Sambært BBC vænta vertshús í Norður Írlandi at teirra virksemi fer at økjast. Vónin er at mong fara at leita sær yvirum markið har einki roykibann er.

### Lítil mótstøða

Okkurt stríð hevur verið av nýggju lóggávuni. Bardagar hava verið á fleiri vertshúsum. Ein av hesum var á eini pubb í County Caven, har ein fyristøðumaður varð álopin tá hann noktaði einum fullum roykjara at festa sær í. John Deasy, sum var limur í írska andstøðu flokkinum, Fine Gael, misti starv sítt eftir at hann treiskaðist og fekk sær ein royk inni á pubbini hjá írska tinginum. Mong halda eisini at írska stjørnin skal halda seg burtur frá privatmálum og at lóggávan hevur lítið við fólkaræði at gera, men einamest minnir um einaræði.

### Írar stuðla lóggávuna

Sambært BBC stuðla 70% av øllum írum og heili 40% av roykjarum nýggju lóggávuna. Seinasta kanningin vísir samstundis at 25% av írum roykja. Læknar vóna at roykibannið fer at hava við sær at færri byrja og fleiri gevast við at roykja. Annars leggja írsku myndugleikarnir dent á at lógin er komin fyri at verja tey sum ikki roykja. Tað er eingin loyna at passiv royking skaðar og tí skulu fólk ikki noyðast at arbeiða har roykt verður. Umleið 7000 fólk doyggja árliga í Írlandi av sjúkum sum stava frá royking. Írsku myndugleikarnir meta at peningur, sum verður spardur á heilsuøkinum í framtíðini, fer at verða størri enn inntøkurnar frá roykiavgjøldum.

Mong lond halda eyga við hvussu leikur fer í Írlandi og møguleiki er fyri at fleiri fáa íblástur til líknandi tiltøk. Írska lógin er longu vorðin fyrimynd hjá Noregi, sum væntandi verður næsta tjóð at samtykkja roykibann.

## Ikkiroykjarar skulu hava meira rásarúm

ALMANNA- OG HEILSUMÁL

Hóast rákið í summum av grannalondunum er at arbeiða fyri víðgongdum lógarbroytingum viðvíkjandi royking, sigur landsstýrismaðurin við almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, at einki roykibann fer at koma hendan vegin í bræði.

Ein nýggj roykilóg er júst orðað, men enn er hon ikki góðtikin. Í nýggja lógaruppskotinum, ið er eitt framhald av arbeiðinum hjá Bill Justinussen, verður millum annað mælt til, at aldursmarkið at keypa sigarettir skal broytast, men um tað verður til 18 ár ella 16 ár, er ikki avgjørt enn.

Nýggja lógaruppskotið snýr seg einamest um at tryggja rættindini hjá ikkiroykjarum og avmarka rásarúmið hjá roykjarum, sigur Hans Pauli Strøm. Hann heldur samstundis at tíðin ikki er búgvin til at fáa roykibann í Føroyum. Hann leggur afturat, at um eitt tílíkt var í nýggja lógaruppskotinum hevði tað óivað ikki fingið viðhald í Løgtinginum.

Landsstýrismaðurin við almanna- og heilsumálum sigur at enda, at støðan kanska verður ein onnur um eini 5-10 ár.


